# Land í sjónum



*Nýggjasta bókin hjá Gunnari Hoydal varð framløgd hósdagin. Bókin tekur støði í føroyska samfelagnum seinastu 20 árini.*
*Mynd: Heri á Rógvi*

**Hósdagin legði Gunnar Hoydal sína nýggjastu bók fram fyri almenninginum og fjølmiðlunum. Bókin fevnir um 21 ymiskar tekstir, sum eru settir í tíðarrøð frá fyrst í áttatiárunum til dagin í dag**

ÚTGÁVA
*Heri á Rógvi*

Gamla Bókahandil ella H.N.Jacobsens Bókahandil kenna øll. Húsið, har handilin húsast, er eisini knýtt at nógvari og ríkari søgu. Har var Realskúlin í sínari tíð, og íbúðin hjá fyrstalæraranum, við tí vakra urtagarðinum, standur so at siga órørd frá tíðini, tá ið so mætir rithøvundar sum William Heinesen og Christian Matras gingu í skúlanum.

Tað var eisini í hesari somu íbúðini, at tíðindafundur skuldi vera. Leiðin gongur fyrst inn í handilin; síðani inn eftir skeiva gólvinum. Íbúðin er eisini bæði hugnalig og gomul. Tað er ein heilt serligur dámur og eitt heilt serligt umhvørvi. Urtagarðurin er óføra vakur, veðrið er av tí besta og inni eru tey mentaðu eins og hin ómentaði.

Á skránni er framløga av nýggju bókini hjá Gunnari Hoydal. Útgevararnir kalla bókina eina sjáldsama bók, Gunnar Hoydal, ið avgjørt telist millum teir meiri virknu føroysku rithøvundarnar, hevur skrivað.

Tá bókin skuldi leggjast fram henda dagin, so var tað fyrst Halgir W. Poulsen, sum vegna grunnin fyri húsið og handilin, bjóðaði vælkomin og segði eitt sindur um sjálvt húsið og ætlaninar við húsinum.
Eisini Oddfríður M. Rasmussen frá Mentunargrunni Studentafelagsins, ið hevur givið bókina út, segði nøkur orð vegna grunnin.



*Halgir W. Poulsen er partur av nevndini, sum varðar av húsinum, har Realskúli var í sínari tíð.*
*Mynd: Heri á Rògvi*

## Persónligt

Gunnar Hoydal tók eisini til orðanna henda dagin. Hann greiddi fyrst eitt sindur frá um húsið. Hann segði m.a., at húsið beinleiðis luktaði av bókmentum. Hetta var eitt sera týdningarmikið stað fyri føroyskar bókmentir. Av hesum orsøkum eins og hin framúr vakra urtagarðin, so helt hann seg vera hepnan at sleppa at leggja sína bók fram í íbúðini.

Gunnar tosaði eisini um, at hetta var ein persónlig og kensluborin bók fyri hann. Bókin hevur støði í føroyskum viðurskiftum seinastu tíggju árini, har greitt verður teimum ymsu upplivilsunum gjøgnum áttatiárini, kreppuni og hesa nýggju tíðina, sum hann kallar samtíðina.

Hann hugleiddi eisini eitt sindur um, at sjálvt um Føroyar eru eitt lítið land, so ber til at skriva so sera nógv um og frá hesum góðu oyggjum.

Bókin er at fáa í bókabúðunum. Bókin kostar 190 kr.

# Stríð um næmingarnar á Leiti

**Næmingarnir úr Lopra og av Økrum verða sendir til Vágs at ganga í 6. og 7. flokk, hóast meiriluti í Sumbiar kommunu og skúlaleiðslan vil hava teir at ganga í skúlanum í Sumba**

SKÚLI
*Eyðun Klakstein*



*Børnini í skúlanum á Leiti, sum hoyrir til Sumbiar kommunu, fara longu í 6. flokki til Vágs. Skúlaleiðslan og bygdaráðið halda, at hesi børn skulu til Sumbiar at ganga í 6. og 7. flokki*

Skúlaleiðslan og bygdaráðið í Sumba vil gjarna hava børn úr Lopra og av Økrum til Sumbiar at ganga í 6. og 7. flokk. Men hóast hetta fara næmingarnir framvegis til Vágs, tá teir koma í 6. flokk.

Tveir skúlar eru í Sumbiar kommunu – skúlin í Sumba og á Leiti. Børnini í Sumba ganga í skúla í heimbygdini, meðan børnini í Lopra og á Økrum ganga í skúlanum á Leiti.

Í Sumba ganga børnini til 7. flokk og fara eftir tað til Vágs at ganga í framhaldsdeildini. Skúlin á Leiti hevur bara frálæru til fyrstu 5 flokkarnar, og tí fara hesi børnini til Vágs, longu tá tey koma í 6. flokk.

Hetta heldur bygdaráðið í Sumba verða skeivt, og meirilutin í bygdaráðnum hevur viðmælt, at børnini úr skúlanum á Leiti fara til Sumbiar at ganga í 6. og 7 flokk og síðani fara til Vágs at ganga í framhaldsdeildini.

Men hóast hetta fóru fýra næmingar úr skúlanum á Leiti 20. august til Vágs at ganga í 6. flokk.

## Kunnu hýsa teimum

Leiðslan í Sumbiar skúla sendi fyrr í ár kommununi og skúlastýrinum skriv um næmingarnar á Leiti. Leiðslan helt, at tað var rættast, at næmingarnar komu til Sumbiar at ganga í 6. og 7. flokk.

– Hesi næmingarnir hoyra heima í Sumbiar kommunu, og vit kunnu saktans geva teimum neyðugu undirvísingina í skúlanum hjá okkum fram til 8. flokk. Tí halda vit, at tað er rætt, at hesir næmingarnir koma til Sumbiar at ganga í 6. og 7. flokki, sigur Arnfinnur Bjarkhamar, skúlastjóri í Sumba.

Ein meiriluti í bygdaráðnum í Sumba viðmælti hesum uppskoti, og tað fekk leiðslan í skúlanum eisini boð um.

Skúlastýrið hevði hinvegin ikki eins greiða støðu. Stýrið tosaði við foreldrini at børnunum í skúlanum á Leiti, og tey vóru ikki sinnað at senda børnini til Sumbiar at ganga í skúla.

Tá skúlagongdin byrjaði aftur eftir summarfrítíðina, fóru teir fýra næmingarnir úr skúlanum á Leiti til Vágs at ganga í skúla.

## Óneyðugt at skifta tvær ferðir

Bygdaráðsformaðurin í Sumba, Jacob Vestergaard, er pápi at einum av næmingunum, sum í ár fór til Vágs at ganga í 6. flokk.

– Tað hevði kostað kommununi færri pengar, um vit høvdu børnini gangandi í skúlanum í Sumba fram til 8. flokk, men hetta snýr seg ikki bara um pengar. Um tað gjørdi tað, so hevði tað verið rættasta bara at havt ein skúla í Suðuroynni, sigur Jacob Vestergaard.

– Vit foreldur hildu tað verða skeivt, at børnini skulu skifta skúla tvær ferðir. Tað hevði ivaleyst verið ein trupulleiki fyri nøkur av teimum, um tey fyrst skuldu fara til Sumbiar at ganga í tvey ár og síðani til Vágs at ganga í trý ár. Vit halda, at tað er best, at tey fara beinleiðis til Vágs, tá tey skulu har at ganga í framhaldsdeildini har álíkavæl.

## Foreldrini gjalda

Tað er einki meira hent í málinum, síðani børnini fóru til Vágs at ganga í skúla, men helst verður málið tikið uppaftur í bygdaráðnum.

Tá kann endin verða, at bygdaráðið samtykkir, at børnini á Leiti skulu til Sumbiar at ganga í 6. og 7. flokk, og so mugu foreldrini helst sjálvi gjalda fyri at senda børnini til Vágs hetta tíðarskeiðið.

– Besta loysnin hevði verið, um skúlin á Leiti kundi undirvíst børnunum í 6. og 7. flokki eisini. Hetta royndu vit at fáa í lag fyri tveimum árum síðani, men skúlamyndugleikarnir søgdu nei, sigur Jacob Vestergaard.

– Eg havi tað fínt við málið, sum tað er í løtuni, men tað kann hugsast, at onkur annar í bygdaráðnum fer at taka málið uppaftur, og so fáa vit at síggja, hvat hendir, sigur hann.



# Sendiharri úr Saudi Arabia vitjar Føroyar

SENDIHARRAVITJAN
*Jan Müller*

Um tað er núverandi oljuleiting við Føroyar ella okkurt heilt annað, sum er orsøkin er ilt at siga, men í næstu viku vitjar eingin minni enn saudiarabiski sendiharrin í Danmark í Føroyum. Hetta man vera fyrstu ferð, at ein sendiharri úr einum so týðandi oljulandi vitjar klettarnar úti í Atlantshavi, og tí kann man bara gita, um slík vitjan hevur nakað við tær fyrireikingars, sum eru í Føroyum til oljuvinnu, at gera. Saudi Arabia er heimsins størstu oljuframleiðari og harvið eisini eitt av høvuðslondunum í OPEC, felagsskapinum hjá fleiri oljuframleiðandi londum.

Sendiharrin skal hitta løgmann og aðrar landsstýrismenn og skal vitja ymsastaðni kring oyggjarnar skilst. Leiðin gongur so eisini niðan í Oljumálastýrið, har hann skal hitta Eyðun Elttør, landsstýrismann í oljumálum. Uppá fyrispurning um henda vitjanin hevur samband við tað oljuvirksemi, sum er við at taka seg upp í Føroyum sigur Eyðun Elttør, at tað dugir hann ikki at svara. Tað er einki óvanligt, at útlendskir sendiharrar í Danmark leggja sær leiðina henda vegin, og sum so metir oljumálaráðharrin tí vitjanina sum eina og hvørja aðra sendiharravitjan. Hann hevur ongar viðmerkingar til, um hann undir slíkari vitjan fer at taka spurningin upp um møguligt samstarv á oljuøkinum millum Føroyar og Saudi Arabia.

Eyðun Elttør heldur tað er umráðandi í øllum oljumálinum sum heild, at føroyingar hava bæði bein á jørðini og vísir til løgmansrøðuna á ólavsøku, har tað verður lagt upp til at vísa hógv í øllum oljumálinum – og ikki selja skinnið, fyrr enn bjørnin er skotin. Vit mugu brynja okkum út við toli, og tað er so einki óvanligt, at oljan ikki verður funnin beinanvegin byrjað verður at bora.

# Elttør hitti tveir ráðharrar

OLJUMESSA OG RÁÐHARRAR
*Jan Müller*

Føroyski oljumálaráðharrin Eyðun Elttør, sum í hesum døgum er á oljumessu í Aberdeen saman við nógvum øðrum landsmonnum, nýtti í vikuni høvi til at hitta tveir bretskar ráðharrar. Tað var ráðharrin fyri ídnað og handil, Symmons og ráðharrin fyri orkumál, Brian Wilson. Hesin seinni er valdur í bretska parlamentið fyri Hetland og tí varð fundurin við hann eisini nakað fyri seg. –Harra Wilson helt fyri, at við virkseminum á Atlantsmótinum nærkast vit hvørjum øðrum og tí kundi eg bara staðfesta og fegnast um sigur Eyðun Elttør.

Á fundinum við teir báðar ráðharrarnar var høvi at tosa um mál av felags áhuga og varð niðurstøðan tann, at bretar síggja fegnir størri samvinnu við Føroyar. –Nú var eg einasti landsstýrismaður í Aberdeen og tí royndi eg at umboða áhugamálini hjá Føroyum sum heild so væl tað ber til sigur Eyðun Elttør, sum heldur slíkar fundir hava týdning fyri framtíðar samvinnuna, hóast einki ítøkiligt kom burtur úr.

Í Aberdeen eru umboð fyri fleiri føroyskar fyritøkur. Tær eru við á básinum, sum Menningarstovan skipar fyri. Uppá fyrispurning um ikki turri brunnurin hjá Statoil hevur lagt ein »dempara« á føroysku luttøkuna sigur Eyðun Elttør, at tað metir hann ikki. –Sjálvandi hevði tað verið betri fyri slíka luttøku, um vit høvdu funnið oljuna longu, men hinvegin kenna øll fólk í oljuverðini til oljuleiting og hvat hon ber í sær. Fáa staðni í heiminum hevur man verið so heppin at raka við olju fyrstu ferð borað hevur verið sigur landsstýrismaðurin.

# Tíðindaskriv frá Norðurlandahúsinum 04. september 2001.

**Tíðindaskriv**

Leygardagin 08.09 kl. 14 letur fotoframsýningin hjá Gunnie Moberg upp í Norðurlandahúsinum. Gunnie Moberg kemur upprunaliga frá Gøteborg, men hevur síðan 1960 verið búsitandi á Orkneyoyggjunum.

Gunnie hevur altíð haft stóran áhuga fyri at taka myndir og serliga at taka myndir úr luftini. Eisini hevur hon arbeitt sum fotografur fyri ymiskar tíðindastovur í Skotlandi og Englandi.

Hon hevur eisini arbeitt saman við rithøvundum í Skotlandi og Írlandi. Nevnast kann yrkjarin-og stuttsøgurithøvundurin Georg Mackay Brown, sum hon samstarvaði við um bókina »Orkney Pictures and Poems«. Nógvar av myndinum ið verða við á framsýningini eru úr hesi bók.

Hetta er ikki fyrsta vitjanini hjá Gunnie Moberg í Føroyum. Hon var her á fyrsta sinni í 1977, og hevði tá eina framsýning í Listaskálanum. Í 1989 sýndi hon saman við 12 listafólkum úr Orkney og fram í Norðurlandahúsinum og aftur í 1991, tá myndir hennara úr bókinini »The Faroe Islands« vóru at síggja.
Til fjølmiðlarnar:

Um áhugi er fyri tí, er møguleiki at hitta Gunnie Moberg í tíðarskeiðnum 05.-11.09.01 í Norðurlandahúsinum.

**Bestu heilsanir**
**Norðurlandahúsið í Føroyum**
**Helga Hjörvar, stjóri**



